ISDN2

Ein skjót loysn frá Føroya Tele

Telefon og internet samstundis



Skjótari við ISDN 2:
Stytt um bíðitíðina á internetinum við einum ISDN 2 mótaldi, sum er bæði skjótari og meira álítandi enn eitt vanligt mótald

Fastnet við tveimum telefonlinjum:
So kanst tú verða á internetinum og tosa í telefon samstundis
Fólk kann altíð ringja til tín, hóast tú ert á internetinum.

spar 550,-

Umskifti
mótald
1 tíma montør vitjan
bert 1149,-

Nýstovnan
mótald
1 tíma montør vitjan
bert 1649,-

MiniVigor mótald krevur, windows 98 (2.útgáva) og usb portur. Um neyðugt er við longri montør vitjan er kostnaður pr. tíma 287,50

Tilboðið er galdandi so leingi, vøra er á goymslu. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum

team85

TELEBÚÐIN

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum

# Sandá hvít av mjólk



*Fríggjadagin koppaði ein mjólkarbilur hjá Mjólkavirki Búnaðarmanna útav vegnum við Sandá*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Um middagsleitið fríggjadagin fór ein mjólkarbilur útav vegnum við Sandá í Havn**

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin fór ein av mjólkarbilunum hjá Mjólkarvirki Búnaðarmanna, sum koyrir kring landið eftir mjólk útav vegnum við Sandá í Havn.

Orsøkin var ikki ov nógv ferð, men tað regnaði illa henda dagin, og bilurin er helst farin ov nær vegjaðaranum, sum síðani er gliðin undan tunga bilinum.

Hol kom á tangan á mjólkarbilinum, og mjólkin rann út í Sandánna. Sjálv áin niðri við brúnna á Argjum, var hvít av allari mjólkini.



*Sandá gjørdist hvít av allari mjólkini, sum var runnin í ánna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Roykur, men ongin eldur

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Seinnapartin sunnudagin fekk politiið í Havn fráboðan um, at eldur var í einum húsum við Hoyvíksvegin í Havn.

Fólk, sum komu framvið húsunum, boðaðu frá eldinum, tí nógvur roykur var at síggja.

Boð vórðu send eftir sjúkra- og sløkkiliðsbili, men tá tað kom til stykkis var ongin eldur kortini. Talan var um eina grýtu, har eigararnir høvdu gloymt at sløkkja plátuna, so grýtan stóð og turrkókaði.

– Tað kemur fyri, at vit fáa fráboðanir um eld, sum so vísir seg at vera gáloysni frá fólki, tí tey hava gloymt at sløkkja pláturnar. Men hetta hevði kunnað endað nógv verri, um plátan ikki varð uppdagað, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Tvey fólk vóru í húsinum, og tey komu út í øllum góðum og hava tað gott.



*Roykur, men ongin grind. Politiið í Havn fekk sunnudagin fráboðan um eld, sum síðani vísti seg at vera ein grýta, sum var kókað turr*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Koyrdi í frákenningartíðini

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Síðani fríggjadagin í síðstu viku hevur politiið í Havn tikið tríggjar mans fyri at koyra við kenning. Umframt hesar tríggjar var tað ein, sum var farin at koyra í frákenningartíðini.

Annars verður sagt av politistøðini í Havn, at vikuskiftið hevur verið stak friðarligt.



Vit lata upp í nýggjum hølum í SMS



MIKUDAGIN
25. SEPTEMBER KL. 10.00

Klivin
SMS • tel 318110

mango
Tel. 31 82 82 • Fax. 31 82 84
SMS

SKÁLKUR
SMS • 31 54 00

SPORTMASTER
SMS • Tel 31 95 12

Benetton, Sunset Boulevard, Burger King og Perlan lata upp
MIKUDAGIN 9. OKTOBER KL. 10.00

SMS www.sms.fo